VIÐMERKINGAR

# Stutt skiftistíð má vera eitt krav

**Carl Jóhan Jensen**
*Vegna Hesuferð*



Ein spurningur, sum nógv hevur verið frammi í kjakinum um fullveldið, er eftir hvørjum leisti føroyska samfelagið skal umskipast frá at vera eitt samfelag, ið byggir á studningsbúskap, sum er fíggjaður við pengum frá skattgjaldarum í einum øðrum landi og lántøkum upp á kredittvirði hjá sama landi, til at gerast eitt samfelag, sum byggir á sjálvberandi búskap, har okkara egna virðisskapan er grundarlagið undir samfelagnum.

Við øðrum orðum, hvussu long skal skiftisella niðurlagingartíðin vera?

Tá ið orðaskiftið tók seg upp um ta fyrru fullveldisætlanina hjá landsstýrinum, ta ætlanina, sum tók fyridømi eftir íslendsku loysnini frá 1918, kom eitt í mangar mátar ógrundað áramál fram og varð læst um kjakið sum gjørð um tunnustavir. Í Hvítubók segði ein av útrokningunum, at við fimtan ára skiftistíð bar til at niðurlaga blokkin uttan at henda tilgongd fekk avleiðingar fyri vælferðina ella fylgjur fyri samfelagsbúskapin sum heild. Illa undirbygdar meiningakanningar gjørdu síðani, at hetta áramálið – fimtan ár – fekk alt ov stóran politiskan týdning.

Nú landsstýrið leggur fram eina nýggja ætlan fyri fullveldisgongdina, verður áramálið sum vera man aftur havt á lofti og nógv gitt um nær landsstýrið ætlar, at Heimastýrislógin skal vera tømd og ríkisveitingin niðurlagað.

**Vansarnir við studningsbúskapi**

Yvirhøvur eru búskaparfrøðingar á einum máli um, hvørjir vansarnir eru, ið standast av studningsbúskapi. At tað ikki er hættuleyst at »fáa pening til gávis«, er ein sannroynd, ið bæði er væl og virðiliga lýst. Tað sum serliga eyðkennir samfeløg víðahvar um knøttin, ið fáa slíkar »gávur«, er ábyrgdarsørur búskaparpolitikkur (eins og hjá okkum í fýrsunum), ómegd og væntandi stevnumið. Ein búskapur, sum fyrst og fremst setur lít sína á veitingar frá øðrum, evnar ongantíð at taka samfelagið upp á eitt stig, ið ger tað kappingarført við onnur lond og tann vegin tryggja eina búskaparligu orku, ið einsamøll kann bera og vera ein haldgóð grund undir tí vælferðarsamfelag, sum ein stórur meiriluti av Føroya fólki ynskir.

Niðurlagingartíðin hevur ymsar avbjóðingar við sær, vit skulu eitt nú útvega pening sjálv, ið vit fyrr hava fingið til gávis. Men tað, sum er meira umvert, er, at hon eisini gevur okkum møguleikar, umstøður til at styrkja búskap okkara og greiða gøtuna fyri politiskari, umsitingarligari og vinnuligari ábyrgd og virkisføri.

**Alt hongur á politiska viljanum**

Í sjálvum sær hevur áramálið lítið upp á seg. Tað, ið um ræður, er, at politiskur vilji er til at fremja broytingar innan tilskilaðan tíðarkarm, broytingar, ið taka føroyska samfelagið frá einum studningsbúskapi inn í ein sjálvberandi búskap, sum hevur støði í føroyskari virðisskapan og føroyskum kredittvirði.

Ein trongur tíðarkarmur leggur trýst á ta politisku skipanina og skorar á politikkararnar at taka tær avgerðir, sum eru neyðugar og í sama mun ta ábyrgd, ið vit fyri langt síðani áttu at havt tikið. Við einum ov víðum tíðarkarmi afturímóti verður skilið tað sama, sum alt heimastýrisskeiðið. Tað kvinkar ikki um fliðuna. Í tvey og hálvtrýss ár hava vit havt umstøður at broyta viðurskifti okkara. Kortini eru tær broytingarnar, ið hendar eru í Føroyum øll hesi árini, í høvuðsheitum íkomnar, tá ið danir umskipaðu sína kommunalu og amtskommunalu fyrisiting og kravdu, at samsvarandi broytingar vórðu framdar her á landi (smbr. eitt nú blokkstuðulsskipanina).

Einasta gongda leiðin nú er ein bindandi tíðarætlan, ið ein meiriluti á tingi samtykkir og ein fólkaatkvøða staðfestir. Ein slík tíðarætlan skal áleggja politisku myndugleikunum í Føroyum, at seta í verk tær broytingar, sum krevjast til at fáa í lag ein sjálvberandi búskap.

# ES-avtalan og matvørutrygd

**Ásmundur Guðjónsson**
*Tórshavn 31.januar 2001*



Røddir hava verið frammi í bløðunum um at avtalan landsstýrið hevur gjørt við ES minkar um ella undirgrevur ta matvørutrygd matvørulógin og Heilsufrøðiliga Starvsstovan hava staðið sum garantar fyri. Hesir pástandir eru langt av leið og skal tað í hesi grein verða greitt frá, hvussu matvørutrygdin hevur verið tryggjað og hvussu hon framhaldandi verður tað.

**Matvørutrygd í dag**

Endamálið við matvørulógini er millum annað at tryggja at maturin, íð verður seldur í handlunum ikki er skaðiligur fyri lív og heilsu og er tað til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at tryggja við sínum eftirlitið, at so er.

Hetta verður gjørt uppá tríggjar mátar:

Tann fyrsti er at seta krøv til tey virkir og handlar, sum framleiða og selja mat. Krøvini, sett verða hesum skulu tryggja at framleiðslan fer fram undir heilsufrøðiliga forsvarligum umstøðum og á tann hátt at minka um sannlíkindini fyri at matvøran verður skeift viðgjørt ella dálkað og harvið møguliga heilsuskaðilig. Hetta er eitt tað størsta virksemi eftirlitið hjá Starvsstovuni fæst við.

Matvørulógin ásetur, at tað er forboðið er at selja mat, sum er heilsuskaðiligur ella er undir illgruna fyri at verða tað. Hetta gevur Starvsstovuni møguleika at grípa inn í søluna ella framleiðsluna og steðga øllum til orsøkin er funnin og loyst. Málið verður, um tað verður mett álvarsligt, sent fútanum, sum tekur støðu til um ákæra skal reisast móti viðkomandi fyri brot á matvørulógina. Tað hendir meria enn so fyri, at Starvsstovan kemur fram á ótolandi viðurskifti ella fær fráboðan um hetta.

Triði møguleikin er at landsstýrinum er heimilað at gera reglur (kunngerðir) fyri innflutningi av vørum til Føroya. Bert tvær reisur hevur landsstýrið brúkt hesa heimild. Fyrru ferð var miðskeiðis í áttati árunum, tá krøv vórðu sett til innfluttar kjøtvørur og egg at tey ikki skuldu innihalda salmonella. Senni vórðu bert flogfenaður fevnur av hesi kunngerð. Seinnu ferð var tá neytaøðin var í hæddini Bretlandi, tá var setta bann fyri innflutningi aav kjøti úr Bretlandi

**Bert innflutningseftirlitið verður broytt**

Matvørulógin hevur eftirhondini 16 ár á baki og bert tvær reisur hevur innflutningseftirlit verið brúkt sum amboð í matvørutrygdini, sum greitt er frá omanfyri. Annars hevur verið frítt at flyta mat til Føroya óansæð um maturin hevur dýrauppruna, plantuuppruna ella annan uppruna og tað hevur eisini verið líkamikið hvaðani í heiminum maturin hevur stavað.

Tað er reglan um at innføra innflutningsbann mótvegis ES-vørum, sum nú verður tikin av. Í ES avtaluni hava vit bundið okkum til at hava tað tey kallað eitt ”ikki-diskriminernadi” eftirlit við matvørum. Hetta merkir, at um tú setir krøv til eina matvøru, skal sama krav verða galdandi fyri framleiðsluna av matvøruna her á landi, sum fyri matvøruna vit flyta inn úr ES.

Starvsstovan kann ikki kanna vøruna, tá hon kemur á land og halda henni aftur til kanningar vísa at hon er í lagi. Hinvegin kann Starvsstovan kanna vøruna hjá føroyska móttakaranum.

Sum dømi kann nevnast at um landsstýrið setur krav um at dunnur, sum hava salmonella kunnu ikki seljast í Føroym, so er hetta krav galdandi bæði fyri føroyskar dunnur og ES-dunnur. Tær føroysku verða kannaðar í dunnugarðinum ella har tær verða virkaðar, meðan ES-dunnurnar verða kannaðar hjá heilsølunum ella í handlunum. Um Starvsstovan finnur eitt partí av dunnum við salmonella, verða boð givin um at beina tær burtur.

Henda broyting í innflutningseftirlitinum, sum er ein avleiðing av ES avtaluni, hevur ongan avgerandi týdning, tá talan er um matvørutrygd, heldur er broytingin av meira tekniskum slagi, tí eftirlitið verður í prinsippinum flutt frá bryggjukantinum til heilsølurnar/innflytaran.

Skipanin vit taka yvir frá ES leggur upp til at vit innføra eina skipan við løggildaðum innflytarum, sum skulu ábyrgdast yvir fyri matvørulógini á sama hátt, sum ein framleiðari ger tað. Hetta er fyri so vítt eisini rætt og rímiligt.

**Aðrar matvørutrygdarskipanir í ES**

Teir nationalu matvørumyndugleikarnir í ES (og Føroyum) arbeiða saman um okkurt skuldi verið áfatt og sum krevur samskipaðar atgerðir til tess at verja brúkararn móti heilsuvanda. Skipanin, sum kallast “Rapid Alert” er ein teldupostskipan, har ein myndugleiki, sum verður kunnaður um ein heilsuvanda í eini matvøru boðar frá til hinar myndugleikarnar, sum so kunnu gera nakað við trupulleikan í teirra egna landi, um so er at matvøran er seld higar. Starvsstovan er longu nú í einari líknandi skipan, sum fevnir um Norðurlond. Sum er koma nógvar fráboðanir á Starvsstovuna, men bert fáar eru viðkomandi fyri okkum. Sum dømi kann nevnast at Starvsstovan fekk einaferð fráboðan um, at salmonella varð funnin í franskari sjokulátu sum eisini var seld í Føroyum.

Ein onnur skipan kallast ”Animo”. Henda skipan eigur at tryggja, at allar marknaðeftirlitsstøðir í ES (yvir 300 í tali, har av fyribils ein í Føroyum) fáa fráboðanir um vørupartíir, sum eru avvíst við markið. Hetta ger tað sera trupult at fáa sama partí inn gjørnum eina aðra eftirlitsstøð, tá ein er kunnaður um hetta.

Samanumtikið haldi eg at skribentarnir í bløðunum hava tikið í so dýran til, tá orð sum katastrofa og tílíkt verður brúkt um avtaluna. Matvørutrygdin fer ongan veg nú ES avtalan verður sett í gildi og harafturat eri eg av tí áskoðan, at ES-avtalan gevur føroyska samfelagnum eitt høvi til kanska at endurskoða okkara vanahugsan um at isolatiónin er eina gongda leiðin í hesum sambandi. Framleiðsla av mati og handilin við matvørum er rættiliga globaliseraður og harvið eisini innviklaður í dag. Tekur tú eina pizza til dømis, so kunnu teir einstøku ingrediensirnir í henni stava frá øllum pørtum av heiminum uttan at tú og Starvsstovan vita av tí, ella hava rætt til at vita tað sambært altjóða reglum. Hetta sjálvt um tað stendur at pizzain er framleidd í Danmark. Í einum slíkum føri er eitt innflutningsbann meiningsleyst, tá vit ikki vita hvat fyri land vit skulu seta bannið í móti.

At seta krøv til innfluttu vøruna, soleiðis at hon lýkur ásett heilsufrøðilig krøv, er nakað matørulógin fult og heilt framhaldandi kann tryggja.

VIÐMERKINGAR

# Karsten Hansen verjir seg móti Starvsmannafelagnum

*Karsten Hansen, landsstýrismaður*

Starvsmannafelagið førir fram, at ongar veruligar samráðingar hava verið millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og at Fíggjarmálastýrið ongantíð er komið við nøkrum útspæli ella aftursvari. Hetta er ikki rætt. Tað hava verið seks samráðingarfundir. Fíggjarmálastýrið hevur lagt fimm uppskot um loysn fyri felagið, sum tó allar eru avvístar.

Gongdin í samráðingunum hevur annars verið henda:

18. oktober 2000 var fyrsti fundur. Krøvini hjá Starvsmannafelagnum vóru grundleggjandi broytingar í sáttmálanum. Fastir frídagar skulu vera teir somu sum hja øllum øðrum, úrtíðarlønin skal vera 50% og 100%, dekkarin skal flytast 6 flokkar upp, bátsmaðurin 7 flokkar og kokkurin 6 flokkar. Í fyrsta umfari skuldi tað vera leyst av tí, hini feløgini gera, men kortini vildi felagið treyta sær, at teir ikki detta niður ímillum.

Fíggjarmálastýrið førdi fram, at dekkarar hava altíð fingið somu løn, sama ger hvørjum skipi teir hava verið við.

Avtalað varð, at SF skuldi staðfesta munin millum arbeiðið hjá dekkarunum á Brimli samanborið við aðrar dekkarar.

20. oktober 2000 var annar fundur. Onkur misskiljin hevði verið. SF hevði ikki uppfatað tað sum at teir skuldu venda aftur. Teir staðfestu kortini, at til bar ikki at vísa á beinleiðis broytingar. Teir nevndu tó, at arbeiðsuppgávan verður fjølbroyttari – m.a. størri radius og vandi fyri oljuvanlukkum.

1. november 2000 var triðji fundur. Fíggjarmálastýrið førdi fram, at broyting er fyri maskinstjóran. Har eru størri krøv. Fer maskinstjórin upp, má skiparin eisini fara upp. Tað kann kanska verða ført yvir á bátsmannin. Hann skal eisini hava ein dekkara meiri undir sær. Allir dekkarar eru í dag løntir líka – er dekkarin t.d. á Smyrli ella á Rituni, hevur tað ikki ávirkan á lønina.

Felagið varð spurt, um teir vildu samráðast saman við hinum. Tað kundu teir ikki svarað uppá tá. Teir vildu eisini treyta sær, at úrslitið hongur saman við tí, yvirmenninir fáa.

24. november 2000 var fjórði fundur. Hann var við formenninar í øllum feløgunum, men tað kom ikki nærri nakrari loysn.

27. november 2000 var fimti fundur. Hann var bara við Starvsmannafelagið. Felagnum varð gjørt greitt, at krøvini hjá teimum vóru nøkur og 30%. Lønarhækkingin er millum 8 og 10%, frídagarnir eini 10% og úrtíðin eini 15%. Fíggjarmálastýrið førdi fram, at dekkararnir á Brimli skulu verða flokkaðir sum teir á Tjaldrinum – eingin broyting. Bátsmaðurin kann koma uppá tal, tí har er ávís leiðsla í. Hini krøvini vórðu avvíst – tey verða ikki viðgjørd bara fyri Brimil.

Fíggjarmálastýrið spurdi, um støðan ikki var, at til bar ikki at koma víðari. Tað helt Starvsmannafelagið ikki. Teir mugu vita, hvat avtalurnar við yvirmenninar geva, tí samband má vera millum avtalurnar.

2. desember 2000 var sætti fundur við Starvsmannafelagið. Fíggjarmálastýrið kom við uppleggið um at seta manningarnar sum tænastumenn. Starvsmannafelagið segði nei.

16. januar 2001 sendi Fíggjarmálastýrið Starvsmannafelagnum uppskot um at seta starvsmetingarnevnd í sambandi við Brimil. Starvsmannafelagið vísti uppskotinum aftur í skrivi dagfest 17. januar 2001.

19. januar 2001 sendi Fíggjarmálastýrið felagnum uppskot um at velja semingsmann. Í skrivi dagfest 22. januar 2001 boðaði felagið frá, at tað góðtók ikki, at semingsmaður kom inn í myndina.

31. januar 2001 heitti Fíggjarmálastýrið á Starvsmannafelagið at Brimil verður avgreiddur í sambandi við vanligu sáttmálasamráðingarnar. Tað ber í sær, at eingin konflikt verður um Brimil fyri 1. mars.

31. januar 2001 svaraði Starvsmannafelagið, at málið skal verða avgreitt serskilt og kann als ikki verða blandað saman við og verða tikið upp undir vanligu samráðingunum. Tað skal verða loyst fyrst. Teir hava als ikki hug at svara spurninginum um at eingin konflikt verður um Brimil fyri 1. mars 2001.

Eg harmist um, at neyðugt er at leggja uppskot fyri Løgtingið um sáttmálar fyri Brimil, men sum tað sæst av tí, sum stendur omanfyri, sær tað tíverri ikki út til at ber til at røkka eini samráðingarloysn.

Málið hevur skund, tí øll eftirlitstænastan og sjóbjargingin stendur upp á spæl, nú vártíðin nærkast, og aktiviteturin er vaksandi, samstundis sum nógv útlendsk skip nú eru byrjað at fiska aftur í føroyskum sjógvi sambært galdandi fiskiveiðiavtalum fyri 2001. Haraftrat kemur tilbúgvingin á sjónum, sum er ógvuliga skerd, nú Brimil liggur. Skuldi ein oljuvanlukka hent, hevði hetta havt álvarsamar avleiðingar fyri alt landið, nú tilbúgvingin er á so lágum støði sum nú. Tí er altavgerandi, at V&B fæst at virka optimalt aftur nú

Fíggjarmálastýrið, 1. februar 2001

Tíðindaskriv frá Sjálvstýrisflokkinum:

# Sjálvstýrisloysn í eygsjón

Sjálvstýrisflokkurin skal tryggja, at vit koma trygt á mál í Sjálvstýrismálinum. Og tað hava vit ongantíð havt so góðan møguleika til sum júst nú.

Tað er Føroya fólk sum savnað og miðvíst skal seta dagsskránna. Og tí skulu vit geva okkum neyðuga tíð, og hava fólkið við.

Í fullveldismálinum standa vit nú fult og heilt á upprunaliga uppskotinum frá Sjálvstýrisflokkinum, at yvirtaka øll málsøki sambært Heimastýrislógini eftir fastari skipan, at minka blokkin so líðandi niður, og tá ið hetta er liðugt, verður ein nýggj fólkaatkvøða, har fólkið fær møguleika at taka støðu til, um Føroyar skulu taka fullveldi. Sjálvstýrisflokkurin er ikki bakkaður – tvørturímóti.

Saman við samgonguflokkunum verður nú farið undir at kunna og greiða frá fólkaatkvøðuni um eina trygga sjálvstýrisgongd, sum verður um mánaðarskiftið mai juni í ár.

Fyrsti fundur hjá Sjálvstýrisflokkinum verður á Landsbókasavninum týsdagin tann 6. februar kl. 19.00, har Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag hevur heitt á Helenu Dam á Neystabø, formann sjálvstýrisfloksins, um at greiða fundarfólkinum frá, hvussu fólkaatkvøðan verður skipað, og um ítøkiliga innihaldið. Síðani verður skipað fyri fundum ymsastaðni í oyggjunum, har politisku álitisfólk floksins fara at greiða frá.


HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | sølupr ísur |
|---|---|---|---|---|
| MMC Lancer 1,8D stw. Sýnaður 12/00 | 225.000 | Mai | 1987 | 29.900,00 |
| Citroen BX 1,6 Selec. 5h Sýnaður 03/00 | 55.000 | Aug. | 1992 | 59.000,- |
| Ford Transit 2,5TD | 188.000 | Mai | 1993 | 72.000,- |
| Renault 19 5h bensin | 85.500 | Mars | 1996 | 89.000,- |
| MMC Galant 2,0 GLSI 5h Sýnaður 08/00 | 186.000 | Juni | 1991 | 89.900,- |
| Citroen ZX 1,9D stw. Sýnaður 03/00 | 74.000 | Nov. | 1995 | 99.000,- |
| Renault Megane 1,6e 5h Sýnaður 12/99 | 36.000 | Nov. | 1996 | 109.000,- |
| Toyota Corolla 2,0 D stw. | 94,500 | Des. | 1996 | 119,900,- |
| Citroen Xantia 1,9 TD stw. Sýnaður 12/00 | 85.500 | Mars | 1996 | 125.000,- |
| SEAT Kordoba Vario stw. Diesel | 14.000 | Aug. | 1999 | 134.000,- |
| Nissan Primera 2,0 SLX 4h | 25.000 | Aug. | 1997 | 139.000,- |
| Musso 2,5TD 4x4 Van | 41.500 | Feb. | 1999 | 190.000,- |
| Galloper 2,5 TDi Exceed 5h | 41.000 | Apr. | 1999 | 215.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

opið er leygardagin 03.02.00
frá kl. 10.00-14.00

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820